# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Skattalættin - torvmold í eygu teirra lágløntu

Tað er ein áhugaverdur fyrispurningur, sum formaður Tjóðveldisfloksins hevur sett løgmanni viðvíkjandi skattalættanum, sum samgongan ætlar at lata árini 2006-08. Hann spyr um sosialu grundgevingarnar fyri at veita skattalættan, sum gevur hægru inntøkunum stóran skattalætta í krónum, meðan lág- og meðalinntøkurnar lítlan og ongan lætta fáa.

Tað tykist sera ørkymlandi, at tað er Javnaðarflokkurin sum stendur sum eksponentur fyri slíkum búskaparpolitikki - og at javnaðarfólk tosa um at fólk fara at tíma betur at arbeiða av einum slíkum skattapolitiskum inntrivi. Jú víst er Javnaðarflokkurin í einum borgarligum selskapi í samgonguni, men beinleiðis at fara at føra fram borgarlig argument, tað mátti ikki hóskað seg.

Fyri vanliga arbeiðaran man alt tos um skattalætta tykjast sum torvmold í eyguni. Tey fáu oyruni, ið fella til tey lágløntu, verða skjótt etin uppaftur í øðrum avgjøldum. Gjaldið til samhaldsfasta skal hækkast, ábendingar eru um, at barsilsgjaldið skal hækka, kringvarpsgjøld og veggjøld eru hækkað - og so ikki at tala um oljuavgjaldið, sum fíggjarmálaráðharrin hevur fráboðað, at hann undir ongum umstøðum fer at nerta. Jú, vit skilja væl kritikkin hjá Ingeborg Vinther.

Ikki trúgva vit, at fólkið fer at tíma betur at arbeiða, fyri tað um tey við høgum inntøkum fáa nakrar túsund krónur afturat at ráða yvir - og tey lágløntu nøkur oyru. Um Javnaðarflokkurin veruliga vildi lætta um hjá tí lágløntu, so er annaðhvørt at gera ein djúptøknan skættalætta, sum munar hjá teimum lágløntu, ella at broyta avgjaldspolitikkin, so tað veruliga ger mun hjá teimum lágløntu - oljuavgjaldið er sjálvandi ein møguleiki.

Sosialurin

## Borgarnir velja politikarar at stýra



EYÐGUNN SAMUELSEN
býráðslimur

Sum tveir býráðslimir vísa á í bløðunum, so er undirskot á fíggjarætlanini hjá Klaksvíkar Kommunu triðja árið á rað. Samtyktar eru útreiðslur, ið vilja økja skuldina hjá kommununi úr 90 mió til áleið 150 mió. Samstundis eru inntøkurnar methøgar. Eitt uppskot um at hækka skattaprosentið var ikki samtykt og var undirritaða ein av teimum ið atkvøddi ímóti.

**Hækka skattin uttan fíggjarstýring**
Eg hevði fleiri orsøkir til ikki at atkvøða fyri at hækka skattin. Tá ið vanligi borgarin ferð í bankan og biður um lán, so skal hann hava eina ætlan fyri, hvussu hann ætlar at gjalda skuldina aftur, nær hann byrjar, hvussu stór lánsgjøldini skulu vera, og um hann hevur eina inntøku, ið ger, at hann megnar at gjalda aftur. Eina slíka ætlan hevur Klaksvíkar Kommuna ikki!

Inntøkan hjá Klaksvíkar kommunu hevur í fleiri ár verið størri enn væntað, og hvat er hent? jú øll árini er meirinntøkan farin til óskipaða meirnýtslu og ikki til at gjalda skuld aftur við tí ongin langtíðarætlan er. Undirritaða ferð tí ikki at atkvøða fyri at taka meira inn frá borgaranum í skatti so longi sum hetta bara elvir til óskipaða meirnýtslu.

**Kommunuskatturin rakar sosialt skeivt**
Skattaprosentið í Klaksvík er 20,75 % ið er omanfyri miðal. Kommunuskattaskipanin er samanskrúða soleiðis at tað eru tær lægru inntøkurnar ið gjalda lutfalsliga meira í skatti enn tær hægru. Samstundis lækkar landsstýri landskattin í 2004-2008 á ein hátt, ið gevur lægru inntøkunum minst skattalætta. Skal Klaksvíkar kommuna, uttan nakara langtíðarætlan, leggja stein oman á byrðu hjá teim lægstu inntøkunum, ikki við mínari atkvøðu !

Kommunan eigur ístaðin at ganga á odda og krevja at kommunuskattaskipanin verður endurskoða og hugt verður av nýggjum at skattabýtinum millum land og kommunnur – eisini eigur spurningurin um útjavning at vera umrøddur.

**Raðfesting av íløgum manglar.**
Klaksvíkin hevur eina tílíka støðd, at kravið frá borgarunum til tænastustøðið er næstan eins stórt og í Tórshavn. Munurin er at vit hava ikki teir inntøkumøguleikar í Tórshavn hevur, tí krevur tað harða fíggjarstýring og raðfestingar yvir fleiri ár um vit skulu gera okkum nakrar vónir um at nøkta tørvin.

Trupuleikin í Klaksvíkar býráð er, at øll vilja lat í senn og ongin megnar at skera ígjøgnum. Hvørt ár verður byrja við einum ynskilista og síðan verður skorið so langt niður sum semja fæst um. Ì ár var ynskilistin á íløgusíðuni 92 mió (næstan øll inntøkan) og skorið var niður á 49 mió uttan stórvegis viðgerð, síðan var ætlanin samtykt uttan at hyggja frameftir. Soleiðis hevur verið arbeitt í fleiri ár, sjálvt um nøkur í áravís hava víst á tørvin á raðfesting og langtíðarætlanum, so hava politikarnir ikki megna at semjast um hetta enn.

Tað sum nú hendur í mun til undanfarin ár er, at við hesum politikki er skuldin nú so høg, at ikki ber til longur uttan antin at renna seg fastan, so arbeiðir ið vera sett í verk møguliga mugu steðga av væntandi fíggjarstýringini, ella at fáa eina semju um raðfestingar og gera eina langtíðarætlan. Hetta krevur dirvi at skera ígjøgnum og rygg at standa ímóti við. Alt gott um at leggja búskarligu realitetirnar fram fyri fólkinum, men vit mugu ikki gloyma at tað eru politikarnir ið eru valdir at gera nakað við realitetirnar. Tað er ongantíð ov seint verður tikið til, og ongin ivi skal vera um at Javnaðarflokkurin í Klaksvíkar býráð hevur og framvegis er til reiðar at vera við til hetta arbeiðið ongantíð ov skjótt.

## Halda fram at okra útjaðaran



HERGEIR NIELSEN

Uppskot okkara um at javnseta flutningskostnaðin um Suðuroyar-. Skopunar- og Kallsoyarfjørð við flutningskostnaðin undir Vestmannasundi og Leirvíksfirði fekk góða umrøðu á tingi í 3½ tíma langa orðaskiftinum undir fyrstu viðgerð.

Men har endaði vælvildin so eisini.

Komnir aftur úr rættarnevndini mæla menn frá at samtykkja uppskotið, og siga júst so sum teir plaga, at einki ber til.

Heilgarderingin er, at tað heldur ikki ber til tekniskt at gjøgnumføra uppskotið í verandi líki, og at landsstýrismaðurin eigur at arbeiða ítøkiliga við eini ætlan á økinum og leggja eina frágreiðing fyri Løgtingið til umrøðu.

Einki er meira burturvið enn tað sama.

Uppskotið varð tilevnað í samstarvi við løgfrøðiligu ráðgevingina á løgtingsskrivstovuni, so tann parturin er sjálvandi í lagi.

Sjálvandi er tekniski parturin eisini í lagi, og halda teir seg ikki til at umsita skipaninia, so kunna vit saktans gera tað fyri teir úti um landið.

Sjálvandi er ikki skuggin av tekniskum forðingum í at krevja inn tær upphæddir, ið kravdar verða aðrastaðni, og at landsstýrismaðurin eigur at arbeiða við málinum hava vit hoyrt seinasta mansaldurin og reiðiliga tað.

Alt bendir sostatt á, at vit á ferjuleiðunum um Suðuroyar-. Skopunar- og Kallsoyarfjørð framhaldandi verða okraði í gjøldum út tveimum upp í fimmogtjúgu ferðir kostnaðin um landføstu sambondini.

Somuleiðis bendir alt á, at vit eisini framhaldandi við jøvnum millumbilum fara at hoyra um Suðuroyarloysnir og annað tílíkt, og ivaleyst fara hesar loysnir at hvørva undir havsbrúnni eins ofta tær koma undan.

Fríggjadagin kl. 10 løða teir kanónirnar, og enn eitt uppskot av mongum til bata fyri kappingarførið í tí skjótt hvørvandi útjaðaranum verður skotið niður.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.